**1. november**
Í dag – 7 stig og stilli. Polar Amaroq er inni í Nuuk og landar í dag, og hann skiftir eisini fólk. Polar Nanoq kom inn her at landa svartkalva. Teir hava gott 500 tons inni. Teir vóru útlossaðir í nátt kl 0400. Tað kann ikki sigast annað enn, at tað er óført av landingamonnunum. Teir sigldu á døgurða 2. november. Teir hava eitt sindur av svartkalvakvotu eftir har norðuri, og so er tað toskur, sum er á skránni bæði vestanfyri og eystanfyri. Regina C var inni og skifti fólk. Teir høvdu fiskað í tvey samdøgur og høvdu 110 tons inni av rækjum.





*Klaksvík: Oluffa Hammer, Lisa Tróndheim, Hansina Sigurðsson og Oddbjørg Sigurðsson*



*Kollafjørður: Margreth Jacobsen, Dánjal Petur Olsen, Mariann á Válinum og Áki Ellingsgaard*



*Suðuroy: Róin Schrøter, Sigrun Tausen, Anni Nielsen, Ingunn Tummasarson, Jógvan Midjord, Ásmundur Hansen, Anna E. Jacobsen, Hildur Olsen*



*Sandoy: Jonna Højsted, Eyðvør Dam, Mary Petersen og Beinta Højsted*

"so gott man kann". Er tað málið, so fært tú eina miðal fyritøku burturúr – og tað er galdandi frá toppi til botn í eini fyritøku.

Jim Collins, rithøvundurin til bókina "Good to Great", ið eg nevndi, sigur, at um tú verðuliga innast inni spyr teg sjálvan, "hví skulu vit royna at skapa nakað sum er framúr", so ert tú óiva komin á skeiva hyll – hevur valt skeiva branchu ella skeivt arbeiði". Hevur tú passiónina – so fellur spurningurin tær ikki inn. Ert tú ikki drivin av eini trongd til at gera alt tað tú ger framúr gott, so verður tað ongantíð betur enn miðal. Maersk Mc-Kinney Møller sigur t.d. "Det, der er værd at gøre, er værd at gøre ordentligt" – og við "ordentligt" trúgvi eg ikki at Mc-Kinney Møller meinar so nøkulunda.... – Kanska kundu vit í Føroyum havt eitt hægri ambitiónsniveau...

Hevur tú passiónina, so arbeiðir tú málrættað, setur teg grundiga inn í forrætningina, tú tekur neyðugu avgerðirnar – eisini tær óbehagiligi, sær møguleikarnar, rennir eftir bóltinum allatíðina og tú virðir tínar kundar og setir eina æru í at liva upp til teirra álit. Og tú handlar. Eg veit ikki um vit eru so nógv verri enn onnur – men vit hava í Føroyum ofta lyndi til at tosa um hvat vit áttu at gjørt og hvat vit ætla at gera – men ofta mangla handlingarnar aftanfyri. Tað blívur bara tos. Eisini er tað umráðandi at lúka í urtagarðinum við hvørt – tær óbehagiligu avgerðirnar skulu takast, um man ynskir at fáa eitt framúr úrslit.

Eg vil runda av við tveimum fyri meg sera týdningarmiklum citatum. Tað eina er frá Jack Lemmon sum sigur: "Mistøk eru ikki týdningarmikil. Tað er óttin fyri mistøkum, sum vit skulu óttast fyri. Tað er tað sum heldur okkum aftur, at royna nakað nýtt". Eg haldi at tað er sera beinrakið!

Hitt citati er frá Andre Gide, sum sigur: "man vinnur ikki upp nýtt land, uttan at vera sinnaður at missa land úr eygsjón í longri tíð". Við øðrum orðum, so skal man tola at liva í óvissu – tí um man altíð heldur seg til tað vissa, so verður man verandi á somu strond – so skapar man onki nýtt virksemi – heldur ikki uttanlands.

Við hesum orðum vil eg enn einaferð takka fyri heiðurin sum ársins virki 2007.

Takk fyri øll somul.



*Vestmanna: Jóni Mohr Olsen, Rúni Joensen, Àsla Friis, Britta Joensen, Harriet Olsen, Sólvá á R. Joensen og Elin Johnsdóttir.*